# Nøvn

## Inga Simonsen sjeyti

Í morgin 21. apríl fyllir Inga Simonsen í Havn 70 ár. Inga er næstelsta dóttir Herborg og Gunnar Gunnarsson, sum búðu úti í Mattalág, har Inga vaks upp saman við systkjum sínum - Sólvá, Jórun, Gunnar og Odvør.

Inga tók Realprógv í 1957 og fekk skjótt læupláss á Føroya Jarðarráð. Síðani tá hevur hon so at siga mest starvast í Miðfyrisitingini – fyrst á Landsskrivstovuni, og frá 1986 á Menningarstovuni og síðani í SamVit. Tá ið SamVit í 2009 varð lagt undir Uttanríkisráðið fylgdi Inga



eisini við, og hevur hon hesi bæði seinastu árini arbeitt í Uttanríkisráðnum. – Hon fór frá tann 31. mars í ár.

Inga er kanska mest kend frá sínum arbeiði við framsýningunum uttanlands, sum Menningarstovan skipaði fyri í 1990-unum og fyrst í 2000-árunum, har hon altíð gjørdi sítt arbeiði til lítar. – Hon hevði eisini ein leiklut í samskipanini av teimum vælkendu handverksframsýningunum Hendur og Hugflog, sum Menningarstovan saman við Føroya Heimavirkisfelag skipaði fyri.

Inga giftist í 1965 við Árna Sigurdsson Simonsen úr Fuglafirði – hann andaðist í 1999. – Inga og Árni fingu 2 synir – Marni og Heri – og ommubørnini eru 4 í tali – Fríða, Árni, Inga og Karin. Ommubørnini fylla nógv í hennara lívið, nú hon er givin á arbeiðsmarknaðinum. Inga fer ikki at sita hendur í favn, tí hon hevur so mong ymisk áhugamál.

Vit ynskja Ingu hjartaliga til lukku við teimum 70 árunum. – Vit hava longu verið í føðingardegi hennara, tí hann varð hildin seinasta leygardag á Hotel Føroyum saman við familju og vinum.

## Lena og Roar í Leikalund

Fríggjakvøldið 22.apríl verður konsert við Lenu Anderssen og Roar Amundsen í Leikalund í Klaksvík.

Lena Anderssen er ein av okkara mest elskaðu sangarum og sangskrivarum. Lena hevur síðani seinnu helvt av nítiárunum verið virkin á konsertpallum bæði í Føroyum og uttanlands, og hennara konsertir og fløgur hava fingið óteljandi frálík ummæli og prísir. Hon hevur eisini verið á konsertferðum við navnframum nøvnum sum Roxy Music, Beth Hart og Xavier Rudd.

Lena hevur givið út tríggjar fløgur "Long Distance" (1998), "Can't Erase It" (2004) og "Let Your Scars Dance", ið var kosin ársins fløga í Føroyum í 2007 av bæði Planet



Awards og lesarunum hjá Dimmalætting.

Tónleikurin hjá Lenu er brúktur í fleiri amerikanskum



sjónvarpsrøðum. Teirra millum kunnu nevnast "Scrubs", "Miami Social" og "Nikita".

Lena var í 2009 kosin "Female Vocalist Of The Year" av heimsins størsta grasrótstónleikafelagsskapi Just Plain Folks.

Nýggj fløga við Lenu verður á markninum í summar.

Roar Amundsen er eitt kent navn innan fólka- og popptónleikaraheimin í Danmark. 22.apríl kann hann upplivast í Klaksvík á fyrsta sinni.

Roar Amundsen gav í november 2010 út fløguna Måneskitser. Tónleikurin á fløguni ber brá av íblástri frá m.a. Sebastian, Alberte, Teitur, The Beatles og CV Jørgensen. Lagið "Kamel Kamel" hjá Roar Amundsen hevur verið nógv spælt á DR P4 í ár.

## Nýggj føroysk dvd

Leygardagin 23. apríl kemur nýggj forkunnug føroysk Familju-DVD á marknaðin. Tað er føroyska plátufelagið Rock Pipit Records, sum saman við framleiðslufelagnum Raclip heur tikið stig til at geva út ein film við vælkendu Beintu, Absalon og "Dumsunum". Beinta og Absalon Áargarð hava í fleiri ár ferðast kring landið við framførslum av ymiskum slagi. Við sær hava tey havt skiftandi "figurar", sum hava fingið egið lív og mál gjøgnum búktaluna hjá Absalon; serliga er tað tann heldur óargaligi - men tó óskyldugi - dukkudrongurin Nikláí, sum hevur bergtikið bæði børn og vaksin við sínum stuttligu, men ofta ótilvitaðu speisku viðmerkingum.

Figurarnir hjá Beintu og Absalon eru ikki dukkur og ei heldur bamsur - tær eru "Dumsur"! Í nýggja filminum "Ljósið" tosa tey saman um ljós og um at vera eitt ljós. Harafturat eru eisini sangframførslur frá dumsa-bólkinum "The Duke Quartet" og sum nakað heilt spennandi, ein spildurnýggj sangframførsla við Daniu Tausen av Toftum.




Í samstarvi við SMS verður skipað fyri sonevndum "Release-party" - útgávu-hátíð - á Torginum í SMS leygardagin kl. 14:00. Á skránni vera framførslur frá Beintu, Absalon og Dumsunum, umframt at sangfuglurin Dania Tausen eisini kemur framvið at framføra lagið, sum hon syngur á filminum. Um páskirnar vera framførslur í sambandi við stevnur ymsa staðni kring landið, og eftir páskir verður filmurin til keyps kring landið.

Filmurin er uml. ein tíma til longdar. Harafturat kemur nakað av eykatilfari umframt upptøkur handan leiktjaldið.

# TØKK

Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, familju, vinir og kenningar, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, hjartalag og hjálpsemi, tá ið okkara kæra kona, mamma, vermamma og omma



**Augusta Poulsen**
Ljósá

andaðist og fór heim til Harran.

Takk fyri allar heilsanir, kransar, blómur og gávur til Ellis og Røktarheimið.

Stóra tøkk til tykkum í Mizpa, sum syrgdu so væl fyri ervinum.

Tøkk til tykkum á Ellis og Røktarheiminum, sum vóru góð við Augustu, tíðina hon var har.

Tøkk øll tit, sum vitjaðu hana, meðan hon var sjúk, og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni.

***Andreas,***
***Sofus, Pól og Mirjam við familjum***

## Málningaframsýning í Skúlanum við Løkin

Fyrsta og annan páskadag sýna yvir 30 føroysk listafólk fram um 150 málningar í Runavík. Framsýningin er opin frá kl. 15.00 til kl.19.00.

Málningaframsýningin verður sett av Frits Johannesen kl. 15 fyrsta páskadag.

Í samband við setanina verða tónleikaframførslur.

Peningurin, sum kemur inn frá atgongumerkjasøluni, fer óskerdur til bygging av nýggjum Skótahúsi.

Hesi listafólk sýna fram: Hilmar Højgaard, Heðin Kambsdal, Høgni Thomsen, Lydia Petersen, Harry Knudsen, Sofus Poulsen, Eivør Pállsdóttir, Livar Nysted, Øssur Mohr, Sámal Toftanes, Edith Mørkøre, Jón Magnus Joensen, Maria Lützen, Jógvan Martin Olsen, Maibritt Olsen, Anna Hansen, Jórun P. Danielsen, Durita Rógvadóttir Hansen, Tala Black, Torgunn Eliasen, Eigil Lyngsø, Jóna Birgit Nattestad Olsen, Jógvan Martin Olsen, Petur Jákup Petersen, John David Jóhannesen, Finnleiv Mortensen, Erla Hansen, Jóhann Hendrik Mohr, Torfinn Jacobsen, Beinta Hansen, Jákup Lervig, Fríðvør Ellefsen, Beinta Gaard.